## Yvirlit yvir kliniska vegleiðaraútbúgving

Bygnaður: Útbúgvingin fevnir um 1/6 studentaársverk, sum svarar til 9 ECTS-stig (European Credit Transfer System).Útbúgvingin verður boðin út í 7 eindum, sum hvør varir eina viku og har seinasta eindin fevnir um eina verkætlanarfrágreiðing. Væntast kunnu uppgávur og fyrireiking millum eindirnar.

Lestararøki: Útbúgvingin fevnir um hesi lestrarøki:

:: Læringarástøði og lærutilgongdir
:: Læringarumhvørvi
:: Læringarhættir og vegleiðing
:: Eftirmeting og døming
:: Verkætlanarfrágreiðing

Bókmentir: Tey lesandi verða, áðrenn skeiðið byrjar, biðin um at útvega sær hesar bøkur:

Brøbecher og Ulla Mulbjerg (2005). Klinisk vejledning og pædagogisk kompetence i professionsuddannelser. Munksgaard Danmark.

Helle Schumann Scheel (2000). Praksislæring. Gyldendals Forlag.

Aftur at hesum verður hefti við ískoytisbókmentum útflýggjað, tá ið skeiðið byrjar.

Í donsku kunngerðini um útbúgving av kliniskum vegleiðarum til tær miðallongu framhaldsútbúgvingarnar (nr. 497 frá 20/06/02) stendur í kapitli 1, stk 2:

"Útbúgvingin verður fullførd á sama stigi sum ein miðallong framhaldsútbúgving, íroknað professiónsbachelorútbúgving ella ein bachelorútbúgving"

Skeiðsluttakararnir mugu allir roknast at vera útbúnir, áðrenn nýggja bachelorútbúgvingin kom í gildi.

Tað hevur við sær, at teir eru útbúnir eftir einari skipan, sum er grundað á yrki og menning, men ikki við kravi um tilknýti til gransking.

Endamál: At menna førleikar í kliniskari vegleiðing av teimum lesandi á bachelorstigi, t.e. røkka kunnleika til og arbeiði við evnum, ið leggja upp til granskingartilknýti.

Evni:

:: Próvførsluástøði (argumentatión)
:: Tekstgreining
:: Granskingarháttalag, íroknað skjalfesting, próvfesting (evidens) og góðskutrygging
:: Gjøgnumgongd av lestrarætlanum fyri Bachelorútbúgvingina (Bachelor of Science in Nursing) við høvuðsdenti á bygnað

Sjúkrarøktarfrøðisskúli Føroya hevur valt at seta í verk Skjalaskjáttu sum amboð til at skapa samanhang millum tann ástøðiliga og tann kliniska partin av lestrinum (Námsskipan, s. 4).

Skjalaskjáttan skal "í námsfrøðiligum høpi skiljast sum ein tilvitað innsavning, ein støðug metan av og reflektión um undirvísingar- og lærutilgongdina og úrslitið" (ibid.4). Hetta verður hjá teimum flestu skeiðsluttakarunum eitt amboð, sum teir ikki áður hava arbeitt við ella hava royndir við.

Í eindini verður arbeitt við:

:: Skjalaskjáttuni sum námsfrøðiligt amboð.
:: Skjalaskjáttu-myndlinum sum hann verður brúktur á bachelorútbúgvingini.
:: Innleiðslu til egna nýtslu av skjalaskjáttu í hesari skeiðsgongdini.

Tískil verður mælt til, at skeiðsluttakararnir á skeiðnum sjálvir nýta skjalaskjáttu-myndilin sum eitt námsfrøðiligt amboð. Í lestrarætlanini verður kunningartøkni nýtt og mett á jøvnum føti við lesi-, skrivi- og roknifførleika (Námskipan, s. 4).

:: Innleiðsla í at nýta elektróniskar miðlar til bókmentaleiting í viðkomandi grunnum.
:: Í fyrstu eind verður miðað ímóti at gera lestrarbólkar.

Tema 1: Vitan og sannkenning.

Sannkenning okkara av heiminum, siðfrøðiligu reglur okkara og moralur hava røtur langt afturi í forna Grikkalandi.

Lagt verður í hesari eind fyri við – í søguligum ljósi – at lýsa hugtøkini: sannkenning, vitan og siðfrøði.

Endamál: At skilja hugtøkini, søgu og samfelagsliga tilknýti teirra.

Dentur verður lagdur á røtur aftur til m.a. Sokrates, Platon, Aristoteles og Kant og drigin verða merkingardrøg til nútíðarinnar sannkenningarástøðiligu skúlar og tann týdning, ið teir hava fyri sjúkrarøktina og menningina av sjúkrarøktarástøðinum.

Tema 2: Námsfrøði, tann námsfrøðiliga lærugreinin:

Endamál: Fáa fatan av hugtøkunum námsfrøði og frálærufrøði.

Fata námsfrøði úr søguligum sjónarhorni og draga merkingardrøg fram til nútíðarinnar námsfrøðiligu skúlar.

Undirvísingin tekur støði í:

Teirri klassisku hugvísindaligu siðvenjuni frá 1700-árunum, teirri hugvísindaligu námsfrøðini í 1800-árunum og nýggjari formum fyri hugvísindaliga námsfrøði í 1900-árunum, og strembar eftir at kalla fram drøg í verandi námsfrøðiligum ástøðum.

Í undirvísingini verður arbeitt við, hvussu verandi námsfrøðilig ástøði gjøgnum tíðina hava ávirkað sjúkrarøktarútbúgvingina.

Tema 3: Læring.

Endamál: Fata læring sum eina tilgongd og egnan leiklut sum leiðbeinari í tilgongdini.

Arbeitt verður við læring sum eini fatanarligari (kognitiva) tilgongd, læring sum eini psykodynamiskari tilgongd og læring sum eini samfelagsligari tilgongd.

Tær ymisku tilgongdirnar taka støði í m.a. David Kolb, Edgar Schøn, John Dewey, Negt, Lave og Wenger, Giddens og Niclas Luhman.

Arbeitt verður við læring sum luttakandi læring og meistaralæru, læring sum sosialt virksemi.

Lagt verður upp til eina konstruktivistiska læringarfatan sum grundarlag undir nýtslu av skjalaskjáttuni í útbúgvingini.

Hugtøkini førleiki og útbúgving úr einum læringarsjónarhorni verða gjørd greið og kjakast verður um tey.

Tema 4: Læringarrúm

Endamál: at fata hugtøkini læringarumhvørvi, læringarrúm og læringarstíl og verða før fyri at greina egið arbeiðsøki við støði í hesum hugtøkum.

Àstøðiliga støðið verður ein fatan av, at læringartilgongdir eru kontekstbundnar og m.a. knýttar at omanfyrinevndu hugtøkum.

Tema 5. Sannroyndarhugtakið í námsfrøðini

Endamál: Fata hugtakið sannroynd í mun til læring lýst við støði í ymsum ástøðiligum tilgongdum og í mun til egna vegleiðaraútinning.

Støði verður tikið í ástøðiligum tilgongdum, har sannroyndarhugtakið hevur ein týðandi leiklut.

John Dewey og Oscar Negt eins og danskir ástøðingar, eitt nú Henning Salling Olsen, Bo Jacobsen og Knud Illeris, eru umboðaðir.

Kjakast verður um luttakararoyndir og luttakarafortreytir og tær verða settar í samband við fortreytirnar hjá sjúkrarøktafrøðilesandi fyri læring og fortreytirnar hjá vegleiðarunum at vegleiða.

Kunnað verður um kapitalhugtak Bourdieus og roynt verður at fremja fatan fyri tí í mun til, hvussu luttakarafortreytirnar eru treytaðar av tíð og samfelagsligum umstøðum.

Tema 6: Námsfrøði og dannilsi

Endamál: Skilja hugtakið dannilsi, søguliga virðið í hugtakinum og merkingardrøg til nútíðarinnar altjóðaliga mentanarstavnhald.

Fáa fatan av nýggjum dannilsisstavnhaldum, sum í dag eru ráðandi í einum altjóðaligum heimi, har alt er broytiligt og einki er vist.

Lagt verður upp til kjak um avleiðingar av altjóðagerðini sæð sum dannilsiskarmar, hvørjar námsfrøðiligar avleiðingar verða neyðugar at taka og hvønn týdning hetta hevur fyri vegleiðingina av lesandi í einari kliniskari praksis.

Arbeitt verður við støði í hesum við hugtøkunum: samleiki, sjálvsfatan og fakligur samleiki.

M.a. Giddens, Z. Baumann og Thomas Ziehe verða partur av teimum ástøðingum, sum hava boð upp á fatanina av altjóðagerðini og avleiðingar í mun til mentanarhugtakið.

Tema 7: Umhugsan (reflektión) og læring

Endamál: Skilja hugtakið umhugsan.

Skilja sambandið millum umhugsan og læring, og hvussu umhugsanin kann brúkast at menna (kvalifisera) læring í verki.

Sum grundarlag verður lagt fram og kjakast verður um hugtakið umhugsan hjá m.a. Donald Schøn, David Kolb og John Mezirow.

Arbeitt verður við hugtakinum umhugsan í mun til nýtslu av skjalaskjáttu sum læringar- og eftirmetingaramboð í sjúkrarøktaratstøðingaútbúgvingini, umframt týdningin umhugsan hevur fyri menningina í eini yrkisgrein.

Tema 8: Yrki og yrkisliggerð (professionalisering)

Endamál: Skilja hugtakið starv og fáa fatan fyri, hvussu tað at gera eitt fak yrkisligt setur økt krøv til tey, ið inna fakið.

Leitt verður inn í eina sosiologiska tilgongd til yrkishugtakið og lagt verður upp til kjak um yrkisleika (professionalisering) sæð í samfelagsligum ljósi.

Sjúkrarøkt sum yrki verður umrøtt og luttakararnir arbeiða við avleiðingum fyri egið virksemi sum kliniskir vegleiðarar.

Tema 9: Vegleiðing

Endamál: Skilja, hvat liggur í hugtøkunum vegleiðing, vegleiðaraleiklutir, vegleiðingarvirkisskráir, hugtaksamboð og vegleiðingarsambond.

Fáa fatan fyri, hvat ið hevur týdning í einari vegleiðingartilgongd.

Arbeitt verður við kliniskari vegleiðing sum einari tilgongd, har ið vegleiðarin virkið arbeiðir við lærutilgongdini hjá tí lesandi í tí kliniska økinum.

Vegleiðing byggir á eindir frá øðrum gongdum: Vegleiðing, viðtala, sjúkuviðgerð, stuðul (mentorskab) og afturmelding (cauching). Harafturat hevur hugtakið umhugsan ein yvirskipaðan leiklut í vegleiðingarsamanheinginum. Í vegleiðingini verður dentur lagdur á at útbúgva tey lesandi til "hugsandi (reflekteraðar) útinnarar" (Schøn).

Skjalaskjáttan er eitt týðandi amboð í vegleiðingini.

Sum grundarlag verða egnu royndirnar hjá skeiðsluttakarunum úr verki nýttar. Tær verða greindar út frá nýggju ástøðiligu vitanini, sum fingin er til vegar.

Tema 10: Eftirmeting

Endamál: Skilja hugtakið eftirmeting og leiklutin hjá vegleiðaranum í sambandi við eftirmetingina.

Arbeitt verður við eftirmeting sum formativ/menningareftirmeting (udviklingsevaluering) og eftirmeting sum samanfatandi/úrslit ella úrslitaeftirmeting.

Eftirmetingarhættir og eftirmetingaramboð verða gjøgnumgingin og umrødd.

Arbeitt verður við skjalaskjáttu sum eftirmetingaramboði, partvíst við einum samanfatandi eftirmetingarendamáli, partvíst í sambandi við at skapa uppmerksemi um dupulta leiklutin hjá vegleiðaranum bæði sum "vegleiðari" og "eftirmetari".

Í 6. eind verður framhaldandi arbeitt við vegleiðing og eftirmeting.

Dentur verður lagdur á royndir hjá luttakarunum frá egnum virksemi. Praktiskar royndir verða partur av hesum og eru grundarlag undir einari felags fatan fyri, hvat ið góð vegleiðing er. Miðað verður ímóti at styrkja hin einstaka við framtíðar vegleiðing í huga.

Í hesi eind verður lagt upp til ta endaligu verkætlanarfrágreiðingina, og avtalur verða gjørdar um vegleiðing.